## Ongar barnakonur

Kvinnur, sum eru í teimum amerikonsku herdeildunum í Irak, kunnu verða settar fyri ein hernaðardómstól, um tær gerast við barn, meðan tær gera hertænastu har. Higartil hevur reglan verið, at kvinnur, sum gerast við barn í hertænastu uttanlands, verða sendar til USA. Men sambært generalinum Anthony Cucolo er hetta ein vánalig skipan, tí hon kann bera í sær, at herdeildir missa fólk við týðandi serkunnleika. Tí krevur hann, at fólk brúka fyribyrging, ella at tey bíða við tí kynsliga, til tey sleppa heim.



## Vend í Danmark

Eftir fýra ársfjórðingar á rað við minkandi bruttotjóðarframleiðslu er vend komin í danska búskapin, tí sambært teirri seinastu uppgerðini vaks bruttotjóðarframleiðslan 0,6 prosent í triðja ársfjórðingi í ár. Steen Bocian, sum er búskaparfrøðingur hjá Danske Bank, sigur við DR, at úrslitið var betur enn væntað og boðar frá, at danski búskapurin hevur fótað sær aftur. Hann vísir á, at í veruleikanum var vøksturin í Danmark í triðja ársfjórðingi størri enn meðalvøksturin í Evropa. Eitt nú er tann privata nýtslan vaksin, og tað sama er hent við íløgunum.

# Gleða seg til heimferðina

**Um alt gongur væl, verður Skálaberg í Føroyum annan jóladag**



SKÁLABERG
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Frøi var á Hanusi Hansen og øllum hinum føroyingum í Murmansk mánakvøldið, tá ið rætturin feldi dómin: Skipið slapp við at gjalda fimm mió. krónur í bót, men hald skuldi hvørki leggjast á veiðu ella skip.

Sjálvt um skipspappírini vórú flýggjað skipinum eftir mánakvøldið, slapp Skálaberg kortini ongan veg tað kvøldið.

Onkrar fyrisitingarligar orsøkir vóru til, at myndugleikarnir ikki vildu geva Skálaberg loyvi at loysa, men teir skuldu sleppa avstað í dag klokkan 17.30 føroyska tíð.

### Bara bíða

Vit bara bíða, segði Róðin Biskopstø, skipari á Skálabergi, sum vit høvdu í telefonini fyrrapartin.

Teir ellivu menninir umborð gingu bara og bíðaðu eftir klokkuni í vónini um, at ikki okkurt nýtt fór at koma í vegin. Royndir teirra er, at alt gongur líka trekt, og vandin fyri, at skipið eina ferð enn verður hildið aftur, er ikki av, fyrr enn Skálaberg er komin úr russiskum sjógvi.

Lagið á monnunum var kortini gott í dag.

Gongur, sum føroyingar vóna, fer Skipið úr Murmansk í dag og fer inn í Honningsvaár í morgin at bunkra.

So stevna teir móti Føroyum.

### Heim annan jóladag

Jólaaftan verða vit onkrastaðni á leiðini heim, men vit eru so vanir við at halda jól á havinum, segði Róðin Biskopstø.

Gongur sum ætlað, og teir fáa góðan túr heim, væntar Róðin Biskopsø, at teir verða heima annan jóladag á middegi.

Hanus Hansen, reiðari hevði ætlað at siglt heim við Skálaberg. Hann fór tó heim í morgun saman við umboðunum fyri Fiskimálaráðið, Uttanríkisráðið og Fiskiveiðieftirlitið.

Sakførararnir fóru ikki avstað, tí teir vildu vera í Murmansk, til skipið heilt vist slapp avstað.

Teir sjey menninir, sum fóru úr Føroyum mánadagin fyri at avloysa á Skálaberg, hava í dag sitið í Oslo og bíðað eftir, um nakað nýtt hendir. Sleppur Skálaberg avstað, flúgva teir heimaftur.

# Vil hava meira list

**Valdemar Lützens Byggibúð, sum herfyri sóknaðist eftir málningum eftir Ingálvi av Reyni og William Heinesen hevur nú eisini áhuga fyri øðrum málningum**

LIST
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Nógv eru tey, sum eiga málningar, ið tey kundu huygsað sær at selt.

Tað eru royndirnar hjá Høgna Lützen, stjóra á Valdemar Lützens Byggibúð.

Herfyri sóknaðist hann gjøgnum útvarpið eftir málningum eftir William Heinesen og Ingálv av Reyni til at prýða veggirnar á skrivstovu síni.

Kunngerðirnar í útvarpinum fingu so nógv afturljóð, at hann nú hevur tikið næsta stigið. Hann kundi eisini hugsað sær málningar eftir Ruth Smith, Steffan Danielsen og Jógvan Waagstein.

*Hví júst tey listafólkini?*

Tí mær dámar teirra málningar, sigur Høgni Lützen, sum ikki á nakran hátt heldur seg hava skil fyri list.

Ein dag kom eitt fólk inn á gólvið í byggibúðini við einum málningi, og tað var leyst og liðugt. Málningurin skifta eigara beinanvegin. Tann málningin hevur Høgni keypt til sín sjálvs.

Í onkrum førum hava fólk viljað havt meira fyri ein málning, enn Høgni hevur viljað latið. Nøkur boð hevur hann givið, sum hann ikki hevur fingið svar uppá enn.

Í fleiri førum eru tað eldri fólk, sum vilja selja, og tey eru øll ikki komin so langt enn sum til at senda honum mynd við teldupostí av málningi sínum.

Nei, eg eri ikki nakar listsamlari, men kanska er hetta byrjanin, sigur Høgni Lützen.

Tey, sum hava hug at senda Høgna mynd av einum málningi ella hava eitt boð til hansara, kunnu ringja tlf. 213536 ella skriva til vlb@vlb.fo

